Norðoya Heimavirki

# Ein søguligur miðdepil

**Á Norðoya Heimavirki eru tey farin at brynja seg út til summarið. Ætlandi fer at verða meir gjørt burturúr søguliga umhvørvinum, har handilin liggur, nú ferðafólk eru byrjaði at leita sær til Norðoyggjar**

HEIMAVIRKI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Maria Marstein hevur starvast í handlinum hjá Norðoya Heimavirkisfelag í 11 ár. Limir støkka ofta inn á gólvið í Norðoya Heimavirki til eitt prát ella at lata inn heimagjørdar lutir at selja í handlinum*

**Klaksvík:** Á Norðoya Heimavirki eru tey so smátt farin at fyrireika seg til summarið og ferðafólkini. Maria Marstein, sum dagliga starvast í handlinum og eisini stendur fyri innkeypi, heldur eitt vakið eyga við, hvørjar vørur eru á lagri, og hvørjar hon má skaffa meir av. Onkrar av vørunun keypir hon frá virkjum, sum framleiða føroysk pløgg, og aðrar keypir hon frá limum í felagnum, sum bæði virka pløgg og ymsar lutir til handilin at selja.

### Søguligt umhvørvið

Á hvørjum ári móti sumri byrjar ein javnur streymur av bussum við ferðafólki á útferð til Klaksvíkar. Sum oftast er ein vitjan inn á Norðøya Heimavirki ein fastur táttur á hesum útferðum, men Maria fílist eitt sindur á, at so lítil tíð ofta er sett av til at vitja í handlinum. Tá ferðafólkabussarnir koma, verður vanliga fyrst steðga við Christianskirkjuna og síðani við Fornminnissavnið. Síðani verður stegðað við Heimavirkið á veg til ferjuna aftur, men tá mugu ferðafólkini sum oftast skunda sær rættiliga nógv. Og ofta vísir tað seg, at tey høvdu havt hug at steðga longri, tí tey vóru ikki greið yvir, hvussu nógv ymiskt er at fáa í handlinum.

- Nú ein dagin steðgaði ein bussur við einum bólki av kvinnum úr Danmark her. Tær vóru púra ovfarnar av stóra úrvalinum og keyptu heilt fitt av vørum. Men tað var ongin ivi um, at tær fegnar vildu steðga longri, men stundir vóru ikki til tað, um tær skuldu náa Dúgvuna, sigur Maria.

Maria vísir á, at Noroya Heimavirki liggur beint í einum tí søguríkasta staðnum í Norðoyggjum. Handilin húsast á Biskupstø í einum av gomlu bygningunum hjá Kjølbro, har vakra standmyndin hjá Hans Paula Olsen av Kjølbro stendur í túninum framman fyri handilin. Navnframi Nólsoyar Páll búði eisini beint við á bóndagarðinum á Myrkjanoyri, og søguligi Bátaverkstaðurin hjá Jákupi bónda á Biskupstø er eisini nærmasti granni.

- Tað hevði verið hugaligt, um vit kundu fingið onkran at greiða ferðafólkunum frá øllum hesum og soleiðis gjørt vitjanina á Norðoya Heimavirki enn meir áhugaverda, heldur Maria.

### Føroysk klæðir av landinum

Ferðafólkini, sum vitja á Heimavirkinum, eru altíð áhugað í at keypa føroyskar troyggir, men áhugin fyri teimum smærri heimagjørdu vørunum er serliga stórur. Hesar hava tey sum oftast á lagri, tí limirnir í felagnum eru sera ídnir at selja handlinum ymiskt heimagjørt, bæði pløgg og lutir. Handilin hevur gjørt lítið við at upplýsa um, at skóleistar, vøttir, hosir, pannubond o.a er heimabundið, og tað eru ferðafólkini oftast sera ovfarin av at hoyra, tí slíkt fæst næstan ikki longur, hoyrir Maria tey ofta siga.

- Vit føroyingar taka tað jú sum eina sjálvfylgju at, slík pløgg eru heimabundin, men tað gera ferðafólkini avgjørt ikki. So kanska skuldu vit sett eitt lítið merki í, har tað stóð "Handmade in Klaksvík", smílist Maria.

Á Heimavirkinum hava tey eisini alt til føroysk klæðir, og tey bjóða seg eisini fram at seyma vestar og skjúrt fyri fólk, um tey ynskja tað. Eisini er tað meir enn so komið fyri, at handilin hevur fingið bíleggingar uppá føroyska búnan aðrastaðni frá. Heilir kvinnubúnar eru sostatt fleiri ferðir sendir til Noreg og Grønland, greiðir Maria frá.

### Føroyskar mótatuflir

Hesa løtuna, vit vitja inni á Norðoya Heimavirki, kemur ein av limunum inn á gólvið at práta við Mariu um onkran lut, hann kundi hugsað sær at farið í holt við. Maria er sera spent at vita, um hann møguliga dugir at gera føroyskar tuflir. Jú, heldur maðurin. Tað skuldi nokk borið til, um hon veit at siga honum, hvar hann kann skaffa leður. Vit spyrja Mariu, hvør er áhugaður í at keypa føroyskar tuflur og fáa at vita, at eftirspurningurin millum føroyingar eftir hesum tuflum er í hæddini beint nú. Hondgjørdu føroysku tuflurnar eru nevniliga vorðnar hægsti móti aftur saman við føroyska búnanum - bæði hjá monnum og kvinnum.

Sum heild letur Maria væl at stuðlinum, handilin fær frá norðoyingum. Tað er til dømis heilt vanligt, at fólk velja at støkka inn á gólvið hjá Heimvirkinum, tá ein føðngardagsgáva ella gávur til onnur serstøk høvi skulu keypast.

- Jú, vit eru væl nøgd. Tá vit byrjaðu, var tað onkur, sum spáddi, at handlinum kanska fór at vera lív lagað í eini 10 ár. Nú havi vit verið her í meir enn 20 ár, og alt bendir á, at áhugin fyri okkara vørum bara økist, sigur ein bjartskygd Maria Marstein.

## Húsavørður til Elektron

Vit søkja eftir nýggjum húsavørði, at avloysa okkara núverandi húsavørð, sum fer frá vegna aldur.

At vera húsavørður í Elektron er ein fjølbroytt uppgáva, sum bæði krevur góð evni sum handverkari, tøkniligt hegni og góð samstarvsevni.

**FØRLEIKAR:**
- Góðkendur el-innleggjari
- Maskinmeistari

**HÚSAVØRÐURIN HEVUR M.A. ÁBYRGDINA AV:**
- Øllum vanligum uppgávum sum húsavørður
- Neyðstreymsveitingini og el-skipanini
- Fráboðanarskipanum
- Sløkkiútgerðini
- Viðlíkahaldi av bilum
- Tryggingarviðurskiftum
- Viðlíkahaldi av VVS skipanum

Vit kunnu bjóða eitt gott arbeiðspláss við góðum starvsfeløgum. Løn sambært avtalu.

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Ullu Joensen, telefon 34 51 00 ella á telduposti ulla@elektron.fo.

Send eina umsókn við persónligum upplýsingum, útbúgvingum og starvsroyndum til P/F Elektron, Staravegur 9, 110 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 20. apríl 2005. Stíla umsóknina til Ullu Joensen.

**UM ELEKTRON**
Elektron er KT-veitari til føroyska marknaðin. Størstu kundarnir hjá Elektron eru føroysku peningastovnarnir og Toll- og Skattastova Føroya. Størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri. Á Elektron starvast umleið 60 fólk og nettoumsetningurin var umleið 50 mió.kr. í 2004.

**PF ELEKTRON**
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 3219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 34 51 00 - FAX: +298 34 51 01
e-mail: info@elektron.fo

Elektron

Stephanssons Hús